# Latið ikki mótloysi skríð

**- Kemur eitt lítið hóttafall á, so eru tað bara vit sjálvi, sum kunnu gera nakað við tað, og táið 40 ættarlið hava hórað undan okkum í oyggjunum, so er tað tekin um, at tærið er nóg máttmikið mentalt og kropsliga til at byrgja upp fyri, táið sveiggjloddið fer niðan brekkuna, segði Torbjørn Jacobsen millum annað í røðu sínari á fólkafundinum í Lítlu Dímun**



## Dímunarrøðan

Torbjørn Jacobsen

Onkuntíð, táið vit hildu leiðina vestur í hav, annaðhvørt til Grønlands ella alla leiðina yvir til amerikanska meginlandið, og lofttrýstskipanirnar lógu syðri á, tí at eitt máttmikið hátrýst ikki lá suðuri við Azorurnar og pumpaði lægdirnar norður í Grønlandsfjørðin ella norður ímillum okkum og frændurnar í útnorði, plagdu vit at leggja á stórklingruna, stórsirkulin, so tætt uppundir Vestmannaoyggjarnar sum gjørligt. Alt eftir rákinum tóku vit Suðuroyarella Dímunarfjørð ávegis. Táið Lítla Dímun slerdi inn á radaraskermin vistu vit, at hetta um stutta stund var seinasta landkenningin, áðrenn norðurhavið lá víðopið í allar ættir. Sjálvt um vit vita, at Lítla Dímun ikki var til á tíðarinnar morgni, er yngri enn Skapanarsøgan, eitt sovnað gosfjall, so var hon hvørja ferð ein Guðasjón fyri eygunum, líkamikið hvussu líkindini annars vóru. Bermiliregn, orkan ella silvitni. Ein skansi umgyrdur av íðum og vaggandi gjálvi, sjóroki, sum brestist so høgt á loft og krámaði sum hvítar kløur inn í sjónarringin. Aðrar tíðir dró aldan upp og niður við klettin, sum búkurin á einum sovandi dýri. Visti man ikki betur, kundi lagið á Guði havt verið so kátt hin dagin, táið hann savnaði vætnini undir himmalinum á einum stað, soleiðis at turrlendið kom undan, at hann eykavagant slepti eini grótrúgvu úr lógvanum, fyri at geva heimsins stóru støddfrøðingum eitt endaligt fasitt um, hvussu hugtakið symmetri skal skiljast. Ein avsagaður viggvaksin sylindari. Lítla Dímun.



*Tey kvøða Brestirskvæðið fyri fyrstu ferð á Lítlu Dímun. Mynd Jan Müller*

Dímunurnar – brattar, smáar, líta suðureftir báðar. Tað er ikki av tilvild, at Hans Andrias í Áarstovu tengir tær báðar oyggjarnar saman í sanginum: "Lítið yvir Føroyaland." Málfrøðingar halda seg vita, at dí merkir tvey og at muinn merkir heyggur ella høvd. Upprunin er keltiskur. Tveir heyggjar. Stóra- og Lítla Dímun. Og sunnanfyri Suðuroyggin so nýtvigin, sum Heðin Brú tekur til, úr optikkinum hjá einsamalla hvalbinginum í Lítlu Dímun.

Í kvæðaskaldskapinum verður oyggin sett í eitt dramatiskt ljós, sum ein næstan ótakandi kastali. Teir tilkomnu ivast í, um teir yngru eru førir fyri at ganga upp á oynna, í Brestiskvæðinum hjá Mikkjali, hóast sól í skorar gyllir, ongin blæsur vindur á vág og sjógvurin er stillur. Men teir vilja ikki forða bragdarhuginum hjá ungum alvum, hóast teir ivast í teirra kropsliga førleika undir so ekstremum viðurskiftum. Seinasta argumentið hjá Sigmundi gjørdi munin, táið hann í lokreplikkini segði tey vælkendu orðini: "Hann, ið alist við øsku inni, lítið í leikum dugir !"

Kvæðið er eisini eitt slag av einum nekrologi um frumseyðaslagið í oyggjunum. Og sagt verður, at oyggin bar fimmhundrað áseyðir av hesum vártreysta slagi, ið var so stygt og kvikt sum villur fuglur og líka so svart sum kolamógvur. Yrkjarin harmast um, at hvalbingar tóku hendan vargin av, men okkurt bendir á, at teir hava verið frammanfyri sína tíð. Nú hava teir góðan helming gangandi, vælsaktans tí at teir við royndum hava funnið fram til, at tað er mest burðardyggi stovnurin í tali, og við góðari røkt fæst frægasta ressoursurentan burturúr á hendan hátt.

Formliga er landsstýrismaðurin í tilfeingismálum landsins størsti festari, umsitur alla landsjørðina, onkur samríkismaður sigur helst kongsjørðina, og tí kann tað tykjast løgið, at ognarmenninir av teimum 48 hálvgyllunum í Lítlu Dímun hava givið honum tann heiður at flyta fram fyrstu fólkafundarrøðuna á oynni nakrantíð. At hvalbingar reka oynna í felag, og ikki hava stikað seg inni hvør ímóti øðrum, er helst eisini orsøkin til optimala úrslitið á hvørjum ári. Prógv um, at hetta kann gerast í privatum regi, um eigararnir eiga nóg sterka solidaritetskenslu í sær, til at reka vinnu í felag. Í øðrum førum gongur tað oftani av skriðuni og fraklendingurin, oddviti í heimspeki, Jean-Jacques Rousseau, mundi ikki fara heilt skeivur, táið hann útbasuneraði, at tann maðurin,

Sosialurin